UTTAN ÚR HEIMI

# Søguligt úrslit í Danmark

**Fyri fyrstu ferð eydnaðist tað einum forsætisráðharra úr Vinstra at verða afturvaldur til stjórnarleiðara. Men valúrslitið fer uttan iva at seta honum krøv**

DANSKA VALIÐ
*Árni Joensen*
*faerekst@mail.dk*



*Anders Fogh Rasmussen fegnaðist um, at stjórnin kann halda fram, sjálvt um flokkur hansara misti fýra tinglimir*

Hóast tann stóri stjórnarflokkurin misti fýra fólkatingslimir, var Anders Fogh Rasmussen, forsætisráðharri, ovurfegin um úrslitið.

– Stjórnin er sterkari nú, enn hon var undan valinum, segði hann við tey mongu viðhaldsfólkini, sum vóru komin saman í valhølinum hjá Vinstra at halda valkvøldið.

Tað kom heldur óvart á eygleiðararnar í Keypmannahavn, at Vinstri misti fýra tinglimir, men forsætisráðharrin segði seg fegnast um, at hin stjórnarflokkurin, Tey Konservativu, hevði eitt gott val og fekk tveir tinglimir afturat. Hetta er fyrstu ferð í 21 ár, at flokkurin hevur økt sítt tingmanatal.

Spurningurin er so, hvussu afturgongdin hjá Vinstra og framgongdin hjá Teimum Konservativu fer at síggjast aftur í stjórnarsamstarvinum. Konservativi formaðurin, Bendt Bendtsen, bleiv spurdur, um hetta kann hava við sær, at flokkurin fer at krevja fleiri ráðharrar enn teir átta, sum hann hevur havt seinasta valskeið, men hann vildi ikki svara. Aðrir tingmenn hjá flokkinum hava tó longu gjørt vart við, at framgongdin skal síggjast aftur í politikkinum tey næstu árini, og tað kann millum annað benda á, at flokkurin fer at leggja dent á skattalætta, sum hevur verið eitt av evnunum hjá flokkinum undir valstríðnum.

Samstundis er tað greitt, at stuðulsflokkurin hjá stjórnini, Danski Fólkaflokkurin, fer at seta stjórnarflokkunum fleiri treytir aftur fyri samstarv. Flokkurin fekk tveir tinglimir afturat, og Pia Kjærsgaard, floksformaður, segði valkvøldið, úirslitið er ein áheitan á flokkin um at halda fram við stuðulinum til stjórnina. Men hon legði dent á, at Danski Fólkaflokkurin vil hava størri ávirkan á politikkin í næsta valskeiði. Hinvegin fer flokkurin ikki at krevja ráðharrasessir - ikki enn.

# Aftur at leita eftir formanni

**Fólkatingsvalið gjørdist ein vanlukka fyri Sosialdemokratarnar, og tí skal flokkurin enn eina ferð finna sær nýgjan formann**

DANSKA VALIÐ
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*



*Tað var ein rørdur Mogens Lykketoft, sum kunngjørdi, at hann fer frá sum floksformaður hjá Sosialdemokratunum*

Tað var ein ikki sørt rørdur Mogens Lykketoft, sum fyrrakvøldið fór á pallin í Copenhagen Jazzhouse og kunngjørdi, at hann fer frá sum formaður hjá Sosialdemokratunum. Flokkurin hevði eitt vánaligt val og misti fimm umboð í Fólkatinginum.

Mogens Lykketoft tók við formansstarvinum eftir Poul Nyrup Rasmussen fyri tveimum árum síðani. Longu tá vóru røddir í flokkinum, sum heldur vildu hava eit ættarliðsskifti í leiðsluni eftir tað gamla liðið við Nyrup, Lykketoft, Svens Auken og Ritt Bjerregaard, og nógv bendir á, at hesi fáa sín vilja nú.

Spurningurin er so, hvussu stórt ættarliðsskiftið verður. Tað er greitt, at menn sum Henrik Dam Kristensen, ES-tinglimur og fyrrverandi ráðharri, og Frank Jensen, fólkatingsmaður og fyrrverandi ráðharri, liggja framvið, men sterkar kreftir í flokkinum halda, at teir eru longu vorðnir ov gamlir, skal talan verða um eitt veruligt ættarliðsskifti. Hesi vilja heldur hava heilt ungar kreftir í leiðsluna, og longu valkvøldið vóru nøvn sum Morten Bødskov, Jeppe Kofod og Mette Frederiksen at hoyra. Tey eru ung, men hava longu vunnið sær pláss sum framsøgufólk hjá flokkinum í ávikavist rættarmálum, uttanríkismálum og mentamálum.

Lesið meira um hetta á síðu 22.

## Mimi gevst eisini

Heldur ikki hesaferð eydnaðist tað Centrumsdemokratunum at sleppa í Fólkatingið, og nú gevst forkvinnan.

Mimi Jacobsen hevur verið ímyndin av Centrumsdemokratunum, síðani pápi hennara, Erhard Jacobsen, sáli, legði frá sær, men eftir tvær miseydnaðar royndir at fáa umboð í Fólkatinginum, gevst hon.

– Eg haldi fram fyribils, men eg stilli ikki uppaftur, segði Mimi Jacobsen, eftir at tað var vorðið greitt, at flokkur hennara hevði fingið bara eitt prosent av atkvøðunum. Avgerð hennara merkir kortini ikki, at flokkurin verður niðurlagdur, men eins og hjá Sosialdemokratunum er eit ættarliðsskifti á veg.

## Afturval í Grønlandi

Lars Emil Johansen og Kubik Kleist vórðu afturvaldir.

Tey bæði grønlendsku umboðini í Fólkatinginum eru tey somu sum undan valinum.

Á listanum hjá Siumut varð Lars Emil Johansen afturvaldur, og veljararnir hjá Inuit Ataqatigiit gjørdu eisini av at velja Kubik Kleist aftur í Fólkatingið.

Siumut hevði eitt gott val og fekk 33,6 prosent av atkvøðunum. Lars Emil Johansen segði gjáranáttina, at valúrslitið er ein viðurkenning av arbeiðinum hjá Norðuratlantsbólkinum, sum teir báðir manna saman við Høgna Hoydal.